# Ársfrágreiðing 2007


| | |
|---|---|
| Fororð | 2 |
| Javnstøðunevndin | 4 |
| Arbeiðssetningur | 4 |
| Nevndarlimirnir | 4 |
| Nevndarfundir og avgreiðsluskrivstova | 5 |
| Samstarv við aðrar stovnar | 5 |
| Føroya landsstýri | 5 |
| Lógarbroytingar | 5 |
| Nevndir, ráð og líknandi | 6 |
| Demokratia – Nevndin fyri øktum kvinnuleikluti í politikki | 7 |
| Granskingardepilin og Hagstovan | 7 |
| Kveik | 7 |
| Kunnandi virksemi | 8 |
| Tíðindaskriv | 8 |
| Í fjølmiðlunum | 8 |
| Kringvarp Føroya | 8 |
| Sjónvarp Føroya | 9 |
| Bløðini | 9 |
| Onnur kunning | 9 |
| Heimasíða | 9 |
| Avgerðasavn | 10 |
| Gallup-kanning | 10 |
| Kærumál | 11 |
| Kæra frá skúlanæmingi um kynsdiskriminerandi viðferð frá skúlaleiðsluni | 11 |
| Kæra um starvslýsing | 11 |
| Kæra um uppsøgn vegna graviditet | 11 |
| Kæra um kynsdiskriminatión á arbeiðsplássi | 11 |
| Kæra um lønarmiss hjá manni í barsilsfarloyvi | 11 |
| Eftirlit og undantaksloyvi | 12 |
| Nevndir og ráð (§8) | 12 |
| Undantaksloyvi | 12 |
| Tilmæli | 12 |
| Broyting í vallógini | 12 |
| Gransking í javnstøðu | 13 |
| Arbeiði fyri øktum kvinnuleikluti í politikki | 13 |
| Samstarv við aðrar tjóðir | 13 |
| Norðurlendsku javnstøðunevndirnar | 13 |
| Altjóða javnstøðuarbeiði | 13 |
| Javnstøða 2008 | 14 |
| Fylgiskjøl | 15 |

# Fororð

“Enn er langt á mál." Hesi orðini standa í almennu viðmerkingunum til løgtingsmál 131/92 um javnstøðulóg. Júst hvussu langt, varð mær skjótt greitt, tá ið eg var biðin at taka við leiðsluni í javnstøðunevndini. Gallup hevur kannað fyri okkum, hvat fólk vita um javnstøðu. Tann stóri toppskorarin er ikki óvæntað kynsbýti í almennum nevndum. Hvat annað stendur í javnstøðulógini, vita tey lítið um; kortini siga nógv seg vita ítøkiliga um mismun vegna kyn á arbeiðsplássum.

Ásetingin um almennar nevndir er tann lættasta at halda, tí hon er tað, tey lógkønu nevna reglu (kann mátast), meðan ástingar um starvsseting, eins løn, eins yrkis- og menningarmøguleikar, eru standardir (mugu metast). Hvørt “umleið eins nógvir” eru av báðum kynum, kann mátast. Til dømis eru fimm mannfólk og eitt konufólk í yrkisráðnum fyri sjóvinnu – 5 er 4 størri enn 1, tvs. ásetingin er ikki hildin, men myndugleikin kann biða um undantaksloyvi.

Nógv verri kann vera hjá nevndini at taka dagar ímillum, hvørt arbeiðsgevarar vegna kyn ikki seta fólk í starv, ikki flyta upp, ikki veita somu ógóðar, osfr., serliga um talan er um óbeinleiðis mismun. Er tað til dømis brot á lóg um javnstøðu, at kvinnur missa pensjónsrættindi, tí barsilsskipanin ikki rindar endurgjald fyri arbeiðsgevarans part av pensjónsgjaldinum? Er tað brot á javnstøðulógina, um kvinnurnar í móttøkuni ikki fáa fría fartelefon, tá ið kontórmenninir fáa – og eru hesi starvsøki “mett at hava sama virði” – ið gevur rætt til “eins løn og ágóða?”

Men størsti trupulleikin hjá javnstøðunevndini er føroyska ‘øvugta sosiala eftirlitið.’ Vanlig misfatan er, at føroyingar halda allar lógir og tora ikki at fremja harðskap – ella mismun vegna kyn – “tí vit eru so lítið samfelag,” har øll vaka sum heykar yvir hvørjum øðrum. Veruleikin er tann øvugti, føroyingar tora ikki at gera vart við órættvísi, lógarbrot og mismun – “tí vit eru so lítið samfelag;” búravnar eiga frítt spæl at kúga.

Í arkivinum hjá nevndini eru sera fá mál, ið ikki eru um antin kynsbýtið í almennum nevndum ella almenna javnstøðu, t.d. hvat javnstøðunevndin heldur um aðrar lógir sum lóg um foreldramyndugleika. Mál um mismun vegna løn, starvstreytir ella viðgongu og barsil er sera sjáldsom.

Hetta er ferfalt løgið, tí:
1. Mismunur er har – fimti hvør sigur seg vita um mismun á arbeiðsplássinum.
2. Eisini óbeinleiðis mismunur er bannaður – mismunur kann tí ikki krógvast.
3. Javnstøðunevndin kann hjálpa fólki at kanna mál og enntá føra rættarmál fyri tey.
4. ...og ikki minst eru pengar at vinna.

Til hetta síðsta, so eru fleiri heimildir í javnstøðulógini, sum pengar eru í. Er mismunur

gjørdur í starvssetan (ella t.d. uppsøgn, flokking, flyting, rættindum) kann veitast løntakara samsýning upp til 20 vikur í løn. Eisini tey, ið vera fyri mismuni ella vanbýti, tí tey krevja sín rætt eftir lógini (t.d. til somu starvstreytir, somu eftirútbúgving, somu ágóðar), kunnu fáa samsýning svarandi til í mesta lagi 20 vikulønir. Er løntakari fyri lønarmismuni vegna kyn, so “skal [hesin] hava útgoldið munin.” Her munnu á góðum havnarmáli vera “formugur, sum ikki eru avhentaðar.” Sambært viðmerkingunum trumfar henda ásetingin enntá møguligan lønarsáttmála.

Tá ið talan er um mismun vegna foreldrafráveru – fráveru vegna viðgongu, barsburð og eftir barnsburð – kann javnstøðunevndin tryggja løntakara upp til 50 vikur í løn fyri uppsøgn ella vanbýti. Júst hesi mál eru heilt vist ikki so fá í tali, og væntandi fáa vit glið á viðgerðina av teimum, um bert nøkur standa fram við málum sínum.

Men aftur til almennu nevndirnar. Fimtan ár eftir, at løgtingið fyrstu ferð viðgjørdi lógaruppskotið um millum annað at fáa javnstøðu í almennar nevndir, verður ikki ein gongd hendan tann mest kenda ásetingin hildin. Almennar nevndir verða settar uttan atlit til javnstøðu, og verður biðið um undantak, er tað vanliga dagin fyri, at nevnd ella bólkur skal fara til verka við áheitan um, at javnstøðunevndin avgreiðir málið í telefonini ella um teldupost.

Hetta sigur so mikið, at hugburðurin er ikki broyttur. Fólk geva sær ikki far um, at fjølbroytni í nevndarsamanseting er styrki. Øvugta sosiala eftirlitið ger, at fólk vænta ikki, at javnstøðunevndin fremur sítt eftirlit, tí í Føroyum torir tann órættaði jú ikki at melda. Skrankapávar og búravnar leggja trýst á: “Vit mugu fáa hatta loyvið nú!” “Man fær ikki arbeitt fyri hasi nevndini!” Týðuligt er, at arbeiðsgevarar føra fram sjónarmið um, hvat skuldi verið galdandi, heldur enn at tala út frá lógini, sum er í gildi.

Nú er ongin orsøk at taka synd í okkum, vit fáa pengar fyri at halda ta lóg, Føroya Løgting hevur samtykt, vit eru sum tjaldrið, ið verjir smáfugl. Hetta er sagt meira tí, at um vit fáa háðarorð omanyvir okkum, so má vera sera tungt hjá teimum, ið eru fyri mismuni at seta seg upp ímóti arbeiðsgevara sínum og krevja sín rætt. Mín størsta virðing til teirra, ið tora at leggja mál síni fyri nevndina.

Mesta partin av míni tíð í javnstøðunevndini havi eg víst á, at flestu ásetingar í javnstøðulógini eru bæði ókendar og ónýttar. Hetta fáa tíðindafólk at vita frá mær, hvørja ferð tey spyrja um javnstøðu – væl at merkja javnstøðu í nevndum, á tingi, í øðrum lógum, og alment um grundgevingar fyri og fyrimunir við javnstøðu. Men ikki fyrr enn avgerðirnar komu, sást grein ella sending um javnstøðu. Fólk eru so, tey skilja best dømið, ikki ásetingina. Nevndin hevur nú gjørt vart við seg, so fólk kenna lógina sum verulig dømi.

Nakað er nú komið áleiðis. Men enn er langt á mál.

Kári á Rógvi, fráfarandi formaður

# Javnstøðunevndin

Javnstøðunevndin er sjálvstøðugur stovnur skipaður undir Føroya Landsstýri, sambært kunngerð undir Vinnumálaráðnum. Virkisøkið er lógarfest við løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn, og hvørs endamál er at beina burtur allan mismun vegna kyn. Játtanin á fíggjarlógini 2007 var kr. 366.000.

## Arbeiðssetningur

Arbeiðssetningurin hjá nevndini er:

- at hava eftirlit við, at lógin um javnstøðu verður hildin, og at viðgera kærur frá fólkum, sum halda seg hava verið fyri mismuni vegna kyn, § 9 og § 11, stk. 1.
- at virka fyri at beina burtur allan mismun vegna kyn innan øll samfelagsøkir og luttaka í samfelagskjakinum við atliti til javnstøðuspurningar og veita upplýsing grundaða á ta vitan, nevndin í arbeiði sínum fær
- at virka fyri eins møguleikum til útbúgving, arbeiði, yrkisligari og mentanarligari menning, § 1
- at virka sum ráðgevi hjá almennum stovnum, feløgum og einstaklingum í javnstøðuspurningum og at samstarva við aðrar almennar stovnar, sum arbeiða við javnstøðumálum
- at geva tilmæli í javnstøðumálum, § 9
- at geva loyvi til frávik frá lógini viðvíkjandi starvslýsing o.ø., og viðvíkjandi setan av nevndum og ráðum, § 3 stk. 2 og § 8, stk. 2, umframt.
- at kunna um javnstøðulógina og –nevndina

## Nevndarlimirnir

Eftir lógini velur Føroya Landsstýri Javnstøðunevndia, seinast var tað landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, ið tilnevndi nevndina.

Føroya Landsstýri, nú avvarðandi landsstýrismaður, velur formannin og tilnevnir eftir tilmæli frá feløgum og stovnum fýra aðrar limir umboðandi:

- løntakarar
- arbeiðsgevarar
- Kvinnufelagasamskipan Føroya
- skúla-, heilsu- og almannaverkið.

Javnstøðunevndin verður vald beint eftir løgtingsval og situr valskeiðið, ið løgtingið situr. Limir kunnu afturveljast.

Javnstøðunevndarlimir 2007 vóru:

Kári á Rógvi, PhD-lesandi, formaður.

Jákup Páll Mohr Mortensen, postboð, løntakarar.
Jan Mortensen, stjóri, arbeiðsgevarar.
Jancy Olsen, skrivstovukvinna, KSF.
Hanna Ziskason Hansen, cand. negot., skúla-, heilsu- og almannaverkið.

## Nevndarfundir og avgreiðsluskrivstova

Seks nevndarfundir hava verið í 2007, og sitandi nevnd fer væntandi at hava ein seinasta nevndarfund tíðliga í januar 2008. Skrivstovuarbeiðið hevur inntil 1. november verið gjørt í privatari skrivstovu í húsi skrivarans. Síðan tað hevur skrivstovan hildið til í leigaðum høli á Søgu- og Samfelagsdeildini í J. Broncksgøtu 25.

# Samstarv við aðrar stovnar

## Føroya landsstýri

Javnstøðunevndin er ein sjálvstøðugur myndugleiki ásettur við lóg og skipaður undir Vinnumálaráðnum. Samstarvið við landsstýrið inniber m.a., at javnstøðunevndin, tá hon gerst varug við evni, sum landsstýrið eigur at taka til umhugsunar ella broyta, boðar landsstýrinum frá hesum.

## Lógarbroytingar

Lóggáva okkara eigur ikki at vera orðað soleiðis, at serligar reglur eru galdandi fyri kvinnur ávv. menn. Lógir, har beinleiðis verður sagt, at kvinna og maður skulu viðgerast á hvør sín hátt, og lógir, sum bara raka annað kynið, ella raka kynini ymiskt, eru aloftast í stríði við javnstøðulógina. Undantikið tó, tá serligar grundgevingar eru, jbr. § 1 í lógini, sum heimilar, at tryggjast kann øðrum kyninum serlig rættindi, tá hesi ætlast at náa endamálinum í lógini.

Nevndin hevur saman við Demokratia vent sær til rættarnevndina[1] um at umhugsa tvinnanda broytingar, sum nevndirnar mæltu til um ársskiftið 2006/07[2], í viðgerðini av uppskotinum um broyting í vallógini (tingmál 5/2007). Haraftrat heittu nevndirnar á rættarnevndina um at greiða tulkingarivan um uppgerð av parallellum listum eftir § 18 í vallógini. Umboð fyri Javnstøðunevndina og Demokratia vóru á fundi um hetta við rættarnevndina 1. oktober.

30. oktober var umboð fyri javnstøðunevndina á fundi við mentanarnevndina um uppskot frá Tjóðveldi um gransking í javnstøðu. 30. oktober vóru umboð fyri javnstøðunevndina og Demokratia á fundi við vinnunevndina um uppskot frá Tjóðveldi um, at Demokratia skal halda fra í 2008.

[1] Sí fylgiskjal 1
[2] Sí fylgiskjal 2

Javnstøðunevndin hevur vent sær til fíggjarnevndina, Fíggjarmálaráðið og Vinnumálaráðið[3] um at tryggja størri játtan í 2008.

## Nevndir, ráð og líknandi

Samb. § 8 í Javnstøðulógini skal kynsbýtið í øllum almennum nevndum, ráðum og líknandi vera javnt, og tað er skylda hjá Javnstøðunevndini at fylgja gongdini við kynsbýtinum í hesum. Nevndin heitti í oktober 2006 á aðalráðini um at útvega yirlit yvir kynsbýtið í nevndum, ráðum og líknandi. Striltið hevur gingist at fáa svar frá summum aðalráðum; seinasta svarið kom í oktober-november.

Javnstøðunevndin gjørdi eina líknandi kanning í 2000, og hesi sjey árini er ávísur, men ógvuliga lítil bati hendur. Í 2000 vóru 70% av nevndarlimunum í teimum táverandi seks aðalráðunum menn; í 2007 er hetta tal fallið til 65%. Í flestu ráðunum er lítil og eingin munur á prosentbýtinum í 2000 og 2007; tó eru tvey undantøk: Fíggjarmálaráðið og Mentamálaráðið. Í Fíggjarmálaráðnum og Mentamálaráðnum vóru ávv. 75% og 63% av nevndarlimunum í 2000 menn, men síðan eru tølini fallin til ávv. 57% og 54%. Í Fíggjarmálaráðnum er javnstøða í 8 av teimum 9 nevndunum. Sostatt hevur Fíggjarmálaráðið havt nógv ta størstu framgongdina í javnstøðu seinastu sjey árini.

63 av teimum tilsamans 102 nevndum hava javnstøðu, t.e. 62%. Í bara heilt fáum førum hava aðalráðini søkt javnstøðunevndina um undantaksloyvi, tá ið nevndir eru mannaðar við ójavnstøðu. Javnstøða verður í hesum føri definerað sum líka nógvir limir av báðum kynum; er talan um ólíkatal, er javnstøða, um nevndin telur ein lim av øðrum kyninum meira enn av hinum. T.d. er javnstøða, um ein nevnd við 5 limum hevur 3 av øðrum og 2 av hinum kyninum, men ikki, um býtið er 4-1.

| | 2000 | | | | 2007 | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Menn | | Kvinnur | | Menn | | Kvinnur | |
| | Tal | Í % | Tal | Í % | Tal | Í % | Tal | Í % |
| Løgmansskrivstovan | 36 | 61 | 23 | 39 | 23 | 62 | 14 | 38 |
| Almanna- og heilsumálaráðið | 21 | 53 | 19 | 47 | 35 | 53 | 31 | 47 |
| Fiskimálaráðið | 50 | 93 | 4 | 7 | 56 | 92 | 5 | 8 |
| Fíggjarmálaráðið | 67 | 75 | 23 | 25 | 29 | 57 | 22 | 43 |
| Mentamálaráðið | 45 | 63 | 27 | 37 | 65 | 54 | 54 | 46 |
| Vinnumálaráðið | 109 | 72 | 43 | 28 | 103 | 71 | 43 | 29 |
| Innlendismálaráðið | - | - | - | - | 67 | 64 | 37 | 36 |
| Tilsamans | 328 | 70 | 139 | 30 | 378 | 65 | 206 | 35 |

[3] Sí fylgiskjal 3

## Demokratia - Nevndin fyri øktum kvinnuleikluti í politikki

Nevndin fyri øktum kvinnuleikluti í politikki (sum hevur fingið heitið Demokratia) skal virka fyri at fáa fleiri kvinnur í politikk. Nevndin hevur 10 limir:

1 umboð úr hvørjum politiskum flokki (6 íalt)
1 umboð fyri Javnstøðunevndina
1 umboð fyri Kvinnufelagasamskipan Føroya
1 umboð fyri Kommunusamskipan Føroya
1 umboð fyri Føroya Kommunufelag

Av ymsum orsøkum fór Demokratia ikki til verka fyrr enn á sumri 2006. Javnstøðunevndin og Demokratia hava síðan tá samstarvað við felags skrivara og einum felags nevndarlimi. Haraftrat hava nevndirnar báðar samstarvað um ymisk átøk, áheitanir o.t. Samstarvið hevur virkað væl og skapt ávísan dynamikk í formi av nógvum almennum áhuga og kjaki um javnstøðu í politikki og annars. Demokratia varð upprunaliga sett at virka fram til ársskiftið 2007-2008, tá hon skuldi handa landsstýrismanninum í javnstøðumálum álit um nevndararbeiðið við tilmælum um, hvussu arbeiðast kann víðari.

74 síðu langa álitið varð handað 19. desember og kann lesast á www.demokratia.fo og á www.javnratt.fo. 5 oktober legði Tjóðveldi fram uppskot um, at Demokratia heldur fram við arbeiði sínum í 2008 við 500.000 kr. í játtan. Uppskotið fall burtur, tá løgtingsval varð útskrivað, men verður vónandi samtykt í 2008.

## Granskingadepilin og Hagstovan

Seinastu tíðina hevur nógv verið frammi í t.d. fjølmiðlunum um kvinnuundirskot í Føroyum. Talið á kvinnum í burðar- og arbeiðsførum aldri er munandi minni enn talið á monnum. Ringast stendur til í útjaðarunum. Samstundis veksur fólkatalið hóast góðar búskaparligar tíðir ikki, tvørturímóti. Spurningurin er, hvør orsøkin til kvinnufráflytingina er; um líkt er til, at henda gongdin fer at halda fram; hvat hetta kann fáa at týða fyri føroyska samfelagið; og um tað ber til at gera nakað fyri at venda gongdini. Javnstøðunevndin hevur avmarkaða orku at fáast við slíkar kanningar og hevur tí í samstarvi við Granskingardepilin vent sær til Hagstovuna um at fáa flytingarmynstrið hjá kvinnum nærri lýst í roynd at fáa eina ábending um orsøkir og møguligar loysnir.

## Kveik

Í apríl varð heimasíðan www.kveik.fo sett á stovn. Kvinnur, sum ynskja at taka lut í nevndararbeiði og líknandi, kunnu skráseta seg og sínar ymsku førleikar á heimasíðuna. Javnstøðunevndin stuðlaði tiltakinum við eini minni upphædd. Haraftrat hava heimasíðurnar hjá Javnstøðunevndini og Kveik samstarvað við sínámillum bannarum o.,t.

# Kunnandi virksemi

Tørvur er á kunning um, hvat javnstøða og javnstøðuhugburður merkir. Eisini er tørvur á upplýsing um lógina, og um hvussu hon kann brúkast. Ein partur av arbeiðinum hevur verið gjørdur saman við Demokratia (sí omanfyri). Ein annar partur av arbeiðinum hevur verið at samskifta við fjølmiðlarnar.

## Tíðindaskriv

Nevndin hevur sent út fleiri tíðindaskriv og hildið tíðindafundir, millum skrivini eru:

- Um alment evniskvøld við fyrilestri hjá Beintu í Jákupsstovu, granskara, um hvat forðar kvinnum í at luttaka í politikki, og hvat kann gerast (januar)
- Framløga av Gallup-kanning (apríl)
- Um alment fyrilestrakvøld við umboðum fyri ávv. donsku og svensku javnstøðunevndirnar (mai)
- Um alment tiltak við Aslaug Gisladóttir, stud. scient. pol. og Janet F. Johannesen frá Kveik (desember)
- Um kanningina av almennum nevndum, ráðum og líknandi (desember)

## Í fjølmiðlunum

Javnstøðunevndin og –lógin hava verið nógv umrøddar í fjølmiðlunum í ár, bæði í kringvarpsinnsløgum, blaðgreinum og lesarabrøvum. Hugtakið javnstøða hevur verið umrøtt óteljandi ferðir, eisini av tí, at Demokratia hevur verið virkin í fjølmiðlunum. Niðanfyri er úrval av innsløgum og greinum o.t., har sjálv Javnstøðunevndin hevur virkað beinleiðis við við at úttala seg:

## Kringvarp Føroya

- samrøða við formannin um positiva diskimination (6. mars)
- enn ein samrøða við formannin um positiva diskriminatión (7. mars)
- samrøða við formannin um barsilsskipan og Gallup-kanningina frá januar (11. apríl)
- samrøða við formannin um uppsøgn vegna barsil/graviditet (juli)
- samrøða við formannin og við umboð fyri norðurlendsku javnstøðunevndirnar (10. mai)
- samrøða við formannin um, at Demokratia ikki skal halda fram í 2008, og at játtanin til javnstøðuarbeiði í 2008 ikki er økt (8. oktober)
- samrøða við formannin um kanningina av almennum nevndum, ráðum o.t. (14. desember)

### Sjónvarp Føroya

- Sendingin *Ekko – vantandi kvinnuumboðan*, send tíðliga í 2007 og endursend í september – eftir hugskoti/áheitan frá Demokratia og Javnstøðunevndini.

### Bløðini

Javnstøðunevndin er fleiri ferðir nevnd í bløðunum, m.a:

- um Gallup-kanningina frá januar (Sosialurin 4. apríl)
- um Gallup-kanningina frá januar (Dimmalætting 4. apríl)
- samrøða við formannin um eitt valdømi og javnstøðu (Sosialurin 9. mai)
- samrøða við formannin um § 18 í vallógini (kvinnulistar) (Sosialurin 27. august)
- samrøða við formannin um § 18 í vallógini (Sosialurin 10. september)

### Onnur kunning

Nevndin hevur skipað fyri ella havt innlegg á hesum almennum tiltøkunum:

- **31. januar**: alment evniskvøld á Hotel Hafnia saman við Demokratia. Beinta í Jákupsstovu, granskari, legði fram úrslit frá spurnakanning millum uppstillað til kommunuvalini í 2000 og 2004 við serligum atliti til kvinnuumboðan. Hon vísti á nakrar forðingar hjá kvinnum í at luttaka í politikki og á nøkur stig, sum kunnu takast fyri at fáa fleiri kvinnur at stilla upp og verða valdar.
- **9. mai**: alment fyrilestrakvøld í Norðurlandahúsinum við tveimum fyrilestrahaldarum: 1) Iben Rostock Jensen, ráðgevi í donsku javnstøðunevndini: Um nýggja felags kærustovnin í Danmark. 2) Magnus Jacobsson, ráðgevi í svensku javnstøðunevndini: Hvat merkir arbeiði av sama virði?
- **28. august**: almennur fundur í Losjuni í Tórshavn um § 18 í vallógini, sum gevur møguleika fyri at gera ein innanhýsis kvinnulista á sjálvum flokslistanum, og um hvussu flokkarnir fara at leggja dent á at fáa eitt javnari kynsbýti á vallistunum til komandi val. Javnstøðunevndin skipaði fyri saman við fimm av politisku flokkunum.
- **7. desember**: almennur fundur á Hotel Hafnia saman við Demokratia. Aslaug Gisladóttir, stud. scient. pol., sum skrivar høvuðsritgerð um kvinnupolitiska umboðan, greiddi frá gransking síni. Janet F. Johannesen, umboð fyri Kveik, greiddi frá arbeiðinum og royndunum hjá Kveik.

Tað kemur eisini fyri, at skúlanæmingar, lesandi o.o. spyrja seg fyri hjá Javnstøðunevndini í sambandi við uppgávur o.t.

## Heimasíða

Heimasíðan (www.javnratt.fo) hevur verið regluliga dagførd. Vitjunartalið hevur verið økjandi síðan 2006:

Vitjunartal/viku í miðal:

| | 2006 | 2007 |
|---|---|---|
| 1. ársfj.: | 27 | 55 |
| 2. ársfj.: | 47 | 41 |
| 3. ársfj.: | 30 | 42 |
| 4. ársfj.: | 42 | 32 |

## Avgerðasavn

Nevndin er í ferð við at byggja eitt avgerðasavn upp á heimasíðuni, har avgerðir hjá Javnstøðunevndini verða lagdar út so hvørt. Haraftrat verða avgerðir 10 ár aftur í tíðina lagdar í savnið. Savnið hevur eina leitiskipan, so skjótt og lætt er at finna tað, ein leitar eftir. Sí annars www.javnratt.fo.

# Gallup-kanning

Javnstøðunevndin fær ikki nógvar kærur ella fyrispurningar um lógarbrot, so sum mismun vegna kyn í sambandi við starvssetan, lønarviðurskifti, barsil osfr. Kortini kemur meira enn so fyri oyra, at fólk fáa viðgerð, sum ikki er í samsvari við javnstøðulógina. Javnstøðunevndin setti sær tí fyri at kanna, hvussu tilvitað fólk eru um javnstøðulógina og javnstøðu yvirhøvur, og haraftrat hvønn hugburð tey hava til javnstøðu. Av praktiskum og fíggjarligum orsøkum hevur Javnstøðunevndin samstarvast við Demokratia, sum eisini hevur valt at kanna nakrar spurningar um hugburð til kvinnur í politikki, og nevndirnar hava í felag samstarvast við Gallup um kanningina.[4]

Kanningin varð gjørd í januar-februar 2007. Gallup ringdi til 517 fólk eldri enn 15 ár kring landið. Kanningin – sum kann lesast á www.demokratia.fo - vísti, at bæði mannfólk og konufólk sum heild hava ógvuliga positivan hugburð til javnsøðu. T.d. heldur meirilutin tað vera neyðugt at hava eina javnstøðulóg, og at almennar nevndir, ráð og líknandi hava javnstøðu. Eisini tekur meginparturin undir við, at øll við A-inntøku gjalda til barsilsskipanina, at barsilsfarloyvið eigur at leingjast, og at bæði kvinnur og menn eiga rætt til útgjald frá barsilsskipanini. Viðv. vitan um javnstøðulógina stendur ikki heilt so væl til. Stórur partur av javnstøðulógini er ókendur og sum áður nevnt óbrúktur. Samstundis sigur stórur partur av teimum spurdu seg kenna dømi um, at lógin verður brotin. T.d. ólíkaløn og ólíka sømdir á arbeiðsplássinum millum kvinnur og menn og noktan av starvi vegna kyn og/ella graviditet. Ein fimtingur sigur seg vita um lógarbrot, men bara 4% kenna dømi um, at mál eru kærd til javnstøðunevndina.

[4] Sí www.javnratt.fo

Stórur meirluti ynskir størri javnstøðu í politikki og heldur, at flokkarnir áttu at gjørt fleiri átøk fyri at bøta um støðuna. 12% av monnunum og 26% av kvinnunum valdu eina kvinnu á løgtingsvalinum 2004, og stórur meiriluti er ímóti kynskvotering.

# Kærumál

Nevndin hevur fingið fimm kærumál í 2007.

## Kæra frá súlanæmingi um kynsdiskriminerandi viðferð frá skúlaleiðsluni

Ein skúlanæmingur hevur vent sær til javnstøðunevndina viðv. viðferðini, næmingurin hevur fingið frá skúlaleiðsluni, og sum næmingurin metir vera kynsdiskriminerandi. Nevndin metti ikki, at málið beinleiðis viðvíkti málsøkinum hjá javnstøðunevndini og heitti á kæraran um í fyrstu syftu at venda sær til Mentamálaráðið.

## Kæra um starvslýsing

Ein borgari hevur vent sær til nevndina viðv. eini starvslýsing frá Innlendismálaráðnum eftir stjóra til nýggjan stovn, m.a. í Dimmalætting 2. mars, sum borgarin metti vera kynsdiskriminerandi, av tí at hetta orðaljóð varð brúkt:

“Stjórin skal vera bæði til gummistivlar og klædning.”

Eftir áheitan frá Javnstøðunevndini skrivaði Innlendismálaráðið eina frágreiðing um orðavalið. Nevndin góðtók frágreiðingina við áminning um at hava javnstøðu í huga; og meira varð ikki gjørt við málið.

## Kæra um uppsøgn vegna graviditet

Ein lærlingur hevur kært eitt virki fyri at hava sagt seg upp vegna graviditet. Í desember tók nevndin avgerð um, at virkið eigur lata lærlinginum endurgjald. Avgerðin við drúgvari frágreiðing um heimildargrundarlagið er at finna í avgerðasavninum á www.javnratt.fo.

## Kæra um kynsdiskriminatión á arbeiðsplássi

Nevndin hevur havt samband við ein borgara, sum metir seg hava verið fyri kynsmismuni á arbeiðsplássinum. Meðan hon var í barsilsfarloyvi, fóru bygnaðarbroytingar fram á arbeiðsplássinum, sum førdu við sær, at hon metti seg fara at fáa verri sømdir, tá hon kom aftur úr barsli. Nevndin fer væntandi at taka støðu í málinum í januar 2008.

## Kæra um lønarmiss hjá manni í barsilsfarloyvi

Ein borgari hevur vent sær til javnstøðunevndina við kæru um arbeiðspláss sítt, sum ikki metir seg hava skyldu at útgjalda honum løn, meðan hann er í barsilsfarloyvi. Nevndin fer væntandi at taka støðu í málinum í januar 2008.

# Eftirlit og undantaksloyvi

## Nevndir og ráð (§ 8)

§ 8 í javnstøðulógini fyriskrivar:

"Allar almennar nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum fyrisitingarvaldið útnevnir, skulu vera sett saman soleiðis, at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir. Sama er galdandi fyri tær nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum løgtingið og bý- og bygdaráðini útnevna, tá ið tey, ið útnevnast skulu, ikki nýtast at vera løgtings- ella bý/bygdaráðslimir.
Stk. 2. Tá ið serligar grundir eru fyri tí, kann javnstøðunevndin geva undantaksloyvi í hvørjum einstøkum føri ella fyri eina yrkisgrein sær."

Tað er skylda hjá Javnstøðunevndini at fylgja við í gongdini av kynsbýtinum í nevndum, ráðum og líknandi.

Javnstøðunevndin hevur í sambandi við omanfyrinevndu kanning enn einaferð mint aðalráðini á, at tey eiga at søkja um undantaksloyvi í hvørjum einstøkum føri, tá tey ikki meta tað bera til at seta eina nevnd við uml. líka nógvum av báðum kynum. Javnstøðunevndin fer í framtíðini at fylgja við, tá ið aðalráðini seta nevndir, ráð og líknandi, og í góðari tíð minna tey á at halda § 8 í javnstøðulógini.

## Undantaksloyvi

Bara ein umsókn er komin um undantaksloyvi sbrt. § 8, stk. 2. Í brævi frá 22. januar søkti Mentamálaráðið um undantaksloyvi fyri útbúgvingarráð um útbúgving av manning á skipum o.ø. Umsóknin varð gingin á møti[5].

# Tilmæli

## Broyting í vallógini

Nevndin hevur saman við Demokratia vent sær til rættarnevndina[6] um at umhugsa tvinnanda broytingar, sum nevndirnar mæltu til um ársskiftið 2006/07[7], í viðgerðini av uppskotinum um broyting í vallógini (tingmál 5/2007). Haraftrat heittu nevndirnar á rættarnevndina um at greiða tulkingarivan um uppgerð av parallellum listum eftir § 18 í vallógini.

[5] Sí fylgiskjal 4
[6] Sí fylgiskjal 1
[7] Sí fylgiskjal 2

### Gransking í javnstøðu

30. oktober var umboð fyri javnstøðunevndina á fundi við mentanarnevndina um uppskot frá Tjóðveldi um gransking í javnstøðu. Umboðið greiddi frá vantandi tølum, sum kunnu vera grundarlag fyri víðari gransking í javnstøðu, t.d. viðv. skúlaverki, útbúgving og arbeiðsmarknaðinum (gagnnýting av menniskjasligum tilfeingi); kvinnupolitiskari umboðan (demokrati) osfr. Í grundini finnast fleiri tøl og kanningar o.t, men tey eru spjødd millum ymiskar stovnar, feløg, einstaklingar osfr. Mælt varð til, t.d. at seta á stovn ein javnstøðuportal ella líknandi, har tøl, sum viðvíkja javnstøðu, eru savnað.

### Arbeiði fyri øktum kvinnuleikluti í politikki

30. oktober vóru umboð fyri javnstøðunevndina á fundi við vinnunevndina um uppskot frá Tjóðveldi um, at Demokratia skal halda fra í 2008. Umboðini mæltu til, at arbeiðið fyri at økja um kvinnuleiklutin í politikki heldur fram í 2008, t.d. í formi av Demokratia ella undir øðrum formi.

## Samstarv við aðrar tjóðir

### Norðurlendsku javnstøðunevndirnar

Javnstøðunevndirnar/umboð í Íslandi, Føroyum, Grønlandi, Danmark, Svøríki, Finlandi og Noregi hittast einaferð um árið til umboðsfund at kunna seg um gongdina í javnstøðarbeiðinum, hvat serliga er frammi, og hvat stendur fyri framman, herundir broytingar í lógarverkinum. 10-11. mai í ár vóru Føroyar vertur fyri 14 umboðum úr omanfyrinevndu londum.[8] Næsta ár verður fundurin hildin í Göteborg.

## Altjóða javnstøðuarbeiði

Samband og samstarv við onnur lond um javnstøðuarbeiði er mennandi. Ymiskt er, hvussu langt ymisku londini eru komin ávegis á javnstøðuleið. Føroyar hava ikki sjálvstøðuga umboðan í ST, men gjørdust bundnar av ST-sáttmálanum frá 18. des. 1979 um avtøku av øllum kynsmismuni móti kvinnum (CEDAW – Convention of Elimination of Discrimination Against Women), tá hesin varð staðfestur fyri Føroyar 21.mai 1983 og sostatt fólkarættarliga bindandi fyri Føroyar. Herumframt samtykti løgtingið 31. mars 1987 at seta sáttmálan í gildi fyri Føroyar.

Í august 2006 var umboð fyri Vinnumálaráðið til próvtøku í ST í New York. Í próvdóminum fáa Føroyar átalu og áheitan um at bøta um serliga hesi viðurskifti:

- lágu kvinnuumboðanina í politikki
- lønarmunin millum menn og kvinnur

[8] Sí fylgiskjal 5.

- lágu kvinnuumboðanina í akademiska umhvørvinum
- lágu kvinnuumboðanina í leiðandi størvum

Dómurin kann lesast á www.javnratt.fo.

Næsta próvtøka verður í 2008. Nevndin vónar at kunna samstarva við Vinnumálaráðið í fyrireikingunum av próvtøkuni.

Fleiri aðrir altjóða felagsskapir arbeiða við javnstøðu, og ynskiligt hevði verið at tikið størri lut í hesum arbeiði. Eitt nú Norðurlandaráðið, IDEA[9], UNDP[10]

# Javnstøða 2008

Mær untust tvey ár í javnstøðunevndini. Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, ringdi til mín í hoyna 2005 um at taka á meg álitissessin sum formaður í javnstøðunevndini. Hjartaliga takki eg honum fyri høvið; tíverri fingu vit tó ikki samstarva stórvegis, tí málsøkið varð flutt frá ráðið hansara.

Javnstøða vegna kyn er týðandi, men tímin man vera komin at víðka arbeiðið at fevna um brek, aldur, uppruna og aðrar javnmetingar og aðrar vandar fyri mismuni.

At vera javnstøðuformaður krevur meira enn fulla arbeiðsorku, og hana hevði eg ikki at geva. Fyrst er lønin bert kr. 3.000 – ikki nógvur løgfrøðingur fæst fyri tann pengan – og síðani var nógv annað á skrá hjá mær sum doktorsnemi í lóg á Háskóla Íslands.

Men hetta er heiðursstarv, og hava vit øll í nevndini lagt orku í verkið saman við dugnaliga skrivara okkara, Bjørg Jacobsen, ið vit settu í starv um árbyrjan 2006. Vit hava roynt okkara besta, men ikki er tryggasta loysn at lata myndugleikastarv vera sjálvboðið.

Tí skal áheitan mín vera á landsins myndugleikar um at broyta javnstøðulógina soleiðis:

- Javnstøðulógin verður víðkað til fleiri øki (brek, aldur, uppruna, onnur)
- Javnstøðunevndin heldur fram við dagførdum virkisøki og breiðari umboðan
- Javnstøðuumboð verður sett at taka sær av arbeiðsmarknaðarásetingum í lógini
- Kærunevnd í javsntøðumálum við umboðum fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum verður skipað sum kærustovnur fyri avgerðir viðvíkjandi arbeiðsmarknaðarásetingum í lógini

Henda broyting eigur eftir míni bestu fata at fremjast alt fyri eitt.

[9] International Institute for Democracy and Electoral Assistance, (www.idea.int). Altjóða felagsskapur stovnaður í 1995, sum arbeiðir fyri at útbreiða og styrkja demokrati í heiminum. Javnstøða er ein sjálvsagdur lutur í arbeiðinum hjá IDEA. 24 lond eru limir, herímillum Danmark, Noreg, Svøríki og Finland.

[10] UNDP United Nations Development Programme (www.undp.org). Felagsskapur undir ST, sum arbeiðir fri betri livikorum kring heimin. Felagsskapurin er umboðaður í 166 londum, herímillum Danmark, Noregi og Svøríki

Vinarliga

Kári á Rógvi, fráfarandi formaður

# Fylgiskjøl

1. Bræv til rættarnevndina
2. Uppskot til broyting í løgtingslóg um val til Føroya løgting
3. Umbøn um størri játtan 2008
4. Játtan av umsón um undantaksloyvi - Mentamálaráðið
5. Frágreiðing frá fundi við norðurlendsku javnstøðunevndunum 10-11. mai 2007

# Fylgiskjal 1

Rættarnevnd Løgtingsins
Postbox 208
110 Tórshavn

Tórshavn, 10. september 2007

**Evni: Broyting í løgtingslóg um val til Føroya Løgting**

Góðu tit,

Javnstøðunevndin og Demokratia (nevndin fyri øktum kvinnuleikluti í politikki) hava í felag mælt landsstýrismonnunum, ið vara av málsøkjunum javnstøðu og valskipan at leggja fyri Føroya løgting uppskot um broyting í løgtingslóg um val til Føroya Løgting.

Mælt varð til tvinnanda broytingar:

- Tann fyrra var at staðfesta, at § 8 í løgtingslóg um javnstøðu er galdandi fyri uppstillingarlistar til løgtingsval, soleiðis at umleið sama tal av hvørjum kyni skal vera á listanum, uttan so at undantaksloyvi fæst frá javnstøðunevndini.
- Tann seinna er at býta listaatkvøðurnar eftir kyni, soleiðis at býtið av løgtingssessum og varalimum verður javnari millum kynini við at javna tær atkvøður, ið hvørki eru persónliga greiddar fyri mannfólki ella konufólki.

Hjáløgd eru uppskotini við nærri viðmerkingum.

Javnstøðunevndin og Demokratia heita nú á rættarnevndina um at umhugsa hesi uppskotini í viðgerðini av uppskotinum um broyting í vallógini (tingmál 5/2007) og um neyðugt at leggja tey fram sum sjálvstøðug løgtingslógaruppskot vegna kravið um 'identitet' í broytingaruppskotum.

Síðani heita vit á rættarnevndina um at greiða tulkingarivan um uppgerð av parallellum listum eftir § 18 í vallógini. Eftir venju verða teir ikki taldir saman í uppgerðini av valdømisvaldum eftir § 31, men bert í landsuppgerðini eftir § 32, sum eftir uppskotinum í tingmáli 5/2007 verður strikað. Eftir uppskotinum skal § 31 verða brúkt til landsúrslitið, tí verður stórur tulkingarivi um § 18-listarnar.

Til tess at tryggja, at § 18-listar altíð telja fult við í floksúrslitinum verður mælt til at áseta, at "listar góðkendir sum listar floksins, smb. § 18, stk. 2, telja sum ein listi" í uppgerðini eftir § 31 uttan mun til, um Føroyar eru skipaðar í eitt ella fleiri valdømi. Eisini hetta eigur at verða gjørt undir øllum umstøðum.

Vinarliga vegna formenninar í Javnstøðunevndini og Demokratia

Bjørg Jacobsen, nevndarskrivari

# Fylgiskjal 2

Vinnumálaráðið Innlendismálaráðið
Tinganes Tinganes
100 Tórshavn 100 Tórshavn

Tórshavn, 20. desember 2006

**Evni: Broyting í løgtingslóg um val til Føroya Løgting**

Góðu tit,

Javnstøðunevndin og Demokratia (nevndin fyri øktum kvinnuleikluti í politikki) hava í felag gjørt av at mæla landsstýrismonnunum, ið vara av málsøkjunum javnstøðu og valskipan at leggja fyri Føroya løgting uppskot um broyting í løgtingslóg um val til Føroya Løgting.

Mælt verður til tvinnanda broytingar.

Hin fyrra er at staðfesta, at § 8 í løgtingslóg um javnstøðu er galdandi fyri uppstillingarlistar til løgtingsval, soleiðis at umleið sama tal av hvørjum kyni skal vera á listanum, uttan so at undantaksloyvi fæst frá javnstøðunevndini.

Hin seinna er at býta listaatkvøðurnar eftir kyni, soleiðis at býtið av løgtingssessum og varalimum verður javnari millum kynini við at javna tær atkvøður, ið hvørki eru persónliga greiddar fyri mannfólki ella konufólki.

Skotið verður upp, at landsstýrismenninir leggja hesi uppskot fyri løgtingið vísandi til hjálagdu viðmerkingar og nærri frágreiðing.

Vinarliga

Bjørg Jacobsen, nevndarskrivari

# Broytingar í vallógini

Nevndin fyri øktum kvinnuleikluti í politikki og javnstøðunevndin mæla til at landsstýrismaðurin leggur fram soljóðandi tvinnanda uppskot til broyting í løgtingsvallógini.

Til tess at tryggja, at annað uppskotið kann vinna frama, tó at hitt verður felt, verður mælt til at leggja bæði uppskotini fram; hesi kunnu kortini sambært tingskipanini verða viðgjørd undir einum.

Uppskotini eru:

- at býta listaatkvøður eftir kyni
- at áseta javnstøðu á valevnislistum

### I. Listaatkvøður býttar eftir kyni.

| Galdandi ásetingar | Broyttar ásetingar |
|---|---|
| § 30. Endaliga uppgerðin av valinum í valdøminum verður gjørd av viðkomandi løgtingsvalnevnd í seinasta lagi vikudagin aftaná valið á tí staði, har valnevndarformaðurin býr.<br>*Stk. 2.* Valnevndin ger nýggja teljing og meting av teimum á hvørjum einstøkum valstaði givnu atkvøðuseðlum eftir reglunum í § 28.<br>*Stk. 3.* Síðan ger nevndin upp fyri hvørt valstað sær, hvussu nógvar persónligar atkvøður hvørt valevni hevur fingið. Uppgerðin verður gjørd fyri hvønn flokk sær eftir hesum reglum:<br>a) Persónligar atkvøður: Hevur veljarin sett kross út fyri navninum á einum valevni og annars ikki givið seðlinum nakað eyðkenni, verður atkvøðan roknað sum givin fyri hesum valevni.<br>b) Listaatkvøður: Hevur veljarin sett kross út fyri floksnavninum ella út fyri nøvnunum á fleiri valevnum ella sett kross yvir allan floksteigin, ella sett krossin á slíkan hátt, at tað ikki við vissu sæst, hvørt av valevnum floksins veljarin hevur atkvøtt fyri, verður atkvøðan at rokna sum listaatkvøða. | § 30. Endaliga uppgerðin av valinum í valdøminum verður gjørd av viðkomandi løgtingsvalnevnd í seinasta lagi vikudagin aftaná valið á tí staði, har valnevndarformaðurin býr.<br>*Stk. 2.* Valnevndin ger nýggja teljing og meting av teimum á hvørjum einstøkum valstaði givnu atkvøðuseðlum eftir reglunum í § 28.<br>*Stk. 3.* Síðan ger nevndin upp fyri hvørt valstað sær, hvussu nógvar persónligar atkvøður hvørt valevni hevur fingið. Uppgerðin verður gjørd fyri hvønn flokk sær eftir hesum reglum:<br>a) Persónligar atkvøður: Hevur veljarin sett kross út fyri navninum á einum valevni og annars ikki givið seðlinum nakað eyðkenni, verður atkvøðan roknað sum givin fyri hesum valevni.<br>b) Listaatkvøður: Hevur veljarin sett kross út fyri floksnavninum ella út fyri nøvnunum á fleiri valevnum ella sett kross yvir allan floksteigin, ella sett krossin á slíkan hátt, at tað ikki við vissu sæst, hvørt av valevnum floksins veljarin hevur atkvøtt fyri, verður atkvøðan at rokna sum listaatkvøða. |

| | |
|---|---|
| *Stk. 4.* Valnevndin kann ikki havna atkvøður, av tí at hesar falla á persónar, hvørs valbæri er ivasamt, men skulu tílíkir spurningar um neyðugt avgerast av løgtinginum. Nevndin ger síðan ta endaligu uppgerðina yvir úrslitið av atkvøðugreiðsluni í valdøminum. Úrslitið verður innført í valbókina og kunngjørt fyri teim hjástøddu. | ***Stk. 4.* Valnevndin ger síðani upp tillagaða persónliga atkvøðutalið. Listaatkvøðurnar verða býttar eftir kyni; so at so nær sum gjørligt annaðhvørt valevni eftir atkvøðutali verður av hvørjum kyni.**<br>*Stk. 5.* Valnevndin kann ikki havna atkvøður, av tí at hesar falla á persónar, hvørs valbæri er ivasamt, men skulu tílíkir spurningar um neyðugt avgerast av løgtinginum. Nevndin ger síðan ta endaligu uppgerðina yvir úrslitið av atkvøðugreiðsluni í valdøminum. Úrslitið verður innført í valbókina og kunngjørt fyri teim hjástøddu. |
| § 31. Uppgerðin av valinum verður gjørd soleiðis, at fyrst verður avgjørt, hvussu nógv valevni skulu verða vald fyri hvønn valevnislista. Samlaða atkvøðutalið fyri hvønn valevnislista verður at býta við 1, 2, 3 o.s.fr. til hvørt atkvøðutalið er býtt við tali eins stórum og talið av sessum, sum avvarðandi valevnislisti kann hugsast at fáa í mesta lagi. Hægsta býtingartalið, sum soleiðis kemur fram, gevur tí lista, sum fær tað í sín lut, rætt til lim nr. 1, næsthægsta býtingartalið gevur tí lista, sum fær tað í sín lut, rætt til lim nr. 2 o.s.fr., til talið á umdømisvaldum limum, ið valdir skulu verða, er býtt millum teir ymisku valevnislistarnar. Standa býtingartølini á jøvnum, skal lutakast fara fram. Lutakastið verður tikið av formanni valevndarinnar, meðan tey, ið hjástødd eru, síggja.<br>*Stk. 2.* Av hvørjum einstøkum lista verða teir valdu limirnir tiknir eftir persónliga atkvøðutali teirra. Standa atkvøður á jøvnum, ger lutakast av.<br>*Stk. 3.* Valnevndin gevur øllum teimum soleiðis valdu eitt valbræv.<br>*Stk. 4.* Í seinasta lagi 2 dagar aftaná at nevndin hevur gjørt upp býtið av limunum, skal valnevndarformaðurin senda landsstýrinum eina váttaða útskrift av tí, sum ført er í valbókina um valið.<br>*Stk. 5.* Atkvøðutilfarið verður goymt av | § 31. Uppgerðin av valinum verður gjørd soleiðis, at fyrst verður avgjørt, hvussu nógv valevni skulu verða vald fyri hvønn valevnislista. Samlaða atkvøðutalið fyri hvønn valevnislista verður at býta við 1, 2, 3 o.s.fr. til hvørt atkvøðutalið er býtt við tali eins stórum og talið av sessum, sum avvarðandi valevnislisti kann hugsast at fáa í mesta lagi. Hægsta býtingartalið, sum soleiðis kemur fram, gevur tí lista, sum fær tað í sín lut, rætt til lim nr. 1, næsthægsta býtingartalið gevur tí lista, sum fær tað í sín lut, rætt til lim nr. 2 o.s.fr., til talið á umdømisvaldum limum, ið valdir skulu verða, er býtt millum teir ymisku valevnislistarnar. Standa býtingartølini á jøvnum, skal lutakast fara fram. Lutakastið verður tikið av formanni valevndarinnar, meðan tey, ið hjástødd eru, síggja.<br>*Stk. 2.* Av hvørjum einstøkum lista verða teir valdu limirnir tiknir eftir **tillagaða** persónliga atkvøðutali teirra. Standa atkvøður á jøvnum, ger **kynsbýtið, í øðrum lagi** lutakast av.<br>*Stk. 3.* Valnevndin gevur øllum teimum soleiðis valdu eitt valbræv.<br>*Stk. 4.* Í seinasta lagi 2 dagar aftaná at nevndin hevur gjørt upp býtið av limunum, skal valnevndarformaðurin senda landsstýrinum eina váttaða útskrift av tí, sum ført er í valbókina um valið. |

| | |
|---|---|
| valnevndarformanninum í 1 ár aftaná valið og skal síðani forkomast. | *Stk. 5.* Atkvøðutilfarið verður goymt av valnevndarformanninum í 1 ár aftaná valið og skal síðani forkomast. |

Formligt uppskot:

**Uppskot**
**um broyting í løgtingslóg nr. 49 frá 20.juli 1978 um val til Føroya Løgting**

§ 1. Gjørdar verða hesar broytingar:
1. Í § 30 verður stk.4 broytt til stk. 5, og verður sett inn soljóðandi nýtt stk. 4:
"*Stk. 4.* Valnevndin ger síðani upp tillagaða persónliga atkvøðutalið. Listaatkvøðurnar verða býttar eftir kyni; so at so nær sum gjørligt annaðhvørt valevni eftir atkvøðutali verður av hvørjum kyni."
2. Í § 31 verður stk. 2 orðað av nýggjum:
"*Stk. 2.* Av hvørjum einstøkum lista verða teir valdu limirnir tiknir eftir tillagaða persónliga atkvøðutali teirra. Standa atkvøður á jøvnum, ger kynsbýtið, í øðrum lagi lutakast av."

§ 2. Lógin kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

**Almennar viðmerkingar**

Løgtingið samtykti 20. oktober 2005, at:

> "Løgtingið tekur undir við, at landsstýrismaðurin setur eina nevnd at arbeiða fyri, at kvinnur fáa ein øktan leiklut í at taka politiskar avgerðir.
>
> Í nevndini verða: Eitt umboð fyri hvønn flokk á Løgtingi, eitt umboð fyri Føroya kommunufelag, eitt umboð fyri Kommunusamskipan Føroya, eitt umboð fyri Kvinnufelagasamskipan Føroya og eitt umboð fyri Javnstøðunevndina. Varalimir verða valdir fyri allar limir."

Hetta var beinleiðis í samsvari við uppskot til samtyktar um tilráðingar frá Útnorðurráðnum í 1999, sum Løgtingið samtykti 18. november 1999.

Í viðmerkingunum til uppskotið sigur:

> "Endamálið við hesum uppskoti til samtyktar er at seta eina nevnd, sum skal skipa fyri tvørpolitiskum tiltøkum til tess at økja um talið á kvinnum á Løgtingi og í kommunustýrunum kring landið. Vónandi kann eitt úrslit av hesum arbeiði verða, at umboðanin á leið verður í samsvari við umboðanina í hinum Norðurlondunum, sum er

væl hægri enn í Føroyum. Í Landstinginum eru uml. 33% konufólk, í Altinginum eru uml. 30% konufólk, og í Fólkatinginum eru uml. 39% konufólk."

Kynbýtið á Føroya Løgtingi er út av lagi vánaligt – bert tríggjar kvinnur eru av 32 tingumboðum, svarandi til færri enn 10%. Hetta hóast kallmenn bert fingu 71,1 %, kvinnur 16,1 %, og 12.8% ikki atkvøddu fyri nøkrum kyni, uttan heldur fyri listanum.

Samsvarandi viðmerkingini um, at "úrslit av hesum arbeiði skal verða, at umboðanin á leið verður í samsvari við umboðanina í hinum Norðurlondunum," hevur hetta uppskotið til endmáls at býta listaatkvøðurnar eftir kyni, soleiðis at umboðanin á Føroya Løgtingi, bæði fasta umboðanin og umboðanin ígjøgnum varaumboð, verður javnari eftir kyni.

Eftir eldri vallóg komu listaatkvøðurnar teimum valevnum til góðar, sum flokkarnir høvdu raðfest. Eftir galdandi vallóg fáa tey, ið atkvøða fyri listanum onga ávirkan á, hvør verður valdur, hóast tey hava latið tað upp til flokk sín at skipa umboðanina. Eftir hesum uppskoti verður tað aftur so, at listaatkvøðurnar verða býttar, nú eftir kyni. Teir veljarar, ið framvegis velja at atkvøða fyri listanum vita nú, at atkvøða teirra verður nýtt til at gera valið betur umboðandi. Teir veljarar, ið heldur vilja velja persón av ávísum kyni kunnu framvegis gera tað við at atkvøða persónliga.

**Serligar viðmerkingar**

*Nýtt § 30, stk. 4*
Eftir hesi ásetingini skulu listaatkvøðurnar býtast eftir kyni so langt tær røkka. Eru tvey fremstu valevnini eftir atkvøðutali av sama kyni, fær fremsta valevni av hinum kyninum so nógvar atkvøður burturav listaatkvøðutalinum, sum krevjast at gerast næstfremst. Soleiðis verðu hildið fram til ongar listaatkvøður eru eftir at býta ella ongin at taka ímóti, so raðfylgjan í atkvøðutali mest møguligt verður annaðhvørt kallur og kona, mannfólk og konufólk.

*Broytt § 31, stk. 2*
Tá stendur á jøvnum skal fyrst takast eftir kyni so nevnda raðfylgja kemur í lag, bert í øðrum lagi skal lutakast vera.

**Dømi, uppgerð av valinum í Suðurstreymi 2004:**

*Valið 2004, raðfylgja, listaatkvøður óbýttar*

| Listi | A | B | C | D | E | H |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Listin | 280 | 490 | 348 | 57 | 234 | 112 |
| Flestar | ♂ - 574 | ♀ - 645 | ♂ - 412 | ♀ - 211 | ♂ - 1421 | ♂ - 407 |
| Næstflestar | ♂ - 450 | ♂ - 551 | ♂ - 380 | ♂ - 77 | ♀ - 527 | ♂ - 52 |
| Triðjflestar | ♂ - 336 | ♂ - 398 | ♀ - 341 | ♀ - 50 | ♂ - 197 | ♀ - 51 |
| Fjórðflestar | ♀ - 152 | ♂ - 185 | ♀ - 308 | ♂ - 33 | ♂ - 197 | ♀ - 48 |

Vald vóru A:2 (umframt 1 fastan varalim fyri landsstýrismann) , B:2, C:2, D:0, E:3, H:1.

*Valið 2004, raðfylgja, listaatkvøðurnar býttar*

| **Listi** | **A** | **B** | **C** | **D** | **E** | **H** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Listin | | | | | | |
| Flestar | ♂ - 574 | ♀ - 645 | ♂ - 412 | ♀ - 211 | ♂ - 1421 | ♂ - 407 |
| Næstflestar | ♂ - 450 | ♂ - 551 | ♀ - 381 | ♂ - 77 | ♀ - 527 | ♀ - 53 |
| Triðjflestar | ♀ - 337 | ♀ - 399 | ♂ - 380 | ♀ - 50 | ♂ - 197 | ♂ - 52 |
| Fjórðflestar | ♂- 336 | ♂ - 398 | ♀ - 308 | ♂ - 33 | ♀ - 197 | ♀ - 48 |

Í døminum verður sama tingmannatal valt, men býtið innanhýsis á listunum verður broytt.

| **Uppgerð** | **Kvinnur valdar** | **Kvinnur fast v.** | **Kvinnur íalt** | **1. var.** |
|---|---|---|---|---|
| *Galdandi uppgerð* | 2 | 0 | 2 | 2 |
| *Broytt uppgerð* | 3 | 1 | 4 | 3 |

Broytingin hevði verið, at heldur enn tvær kvinnur, vóru tríggjar valdar í Suðurstreymi (á lista B, C og E). Harumframt hevði ein verið fastur varalimur á tingi (á lista A) móti ongari í dag, umframt at tríggjar (á lista B, E, H) høvdu verið fyrsti varalimur heldur enn tvær í dag. Sostatt høvdu fýra kvinnur sitið fast á tingi fyri Suðurstreym, og tríggjar aðrar høvdu regluliga verið varaumboð.

Í døminum eru bert fýra ovastu valevnini sett upp, men eftir lógarbroytingini skulu listaatkvøðurnar býtast til antin ikki fleiri akvøður eru eftir at býta, ella ikki fleiri valevni eru at taka ímóti kynsbýttum listaatkvøðum.

*Í døminum sæst:*
Á Lista A eru listaatkkvøðurnar ikki nóg nógvar til at broyta raðfylgjuna ovast á listanum, so at tað verður annaðhvørt konufólk og mannfólk, men eru kortini nóg nógvar at flyta konufólk fram á triðja plássið; tær eru tó ikki nóg nógvar at flyta konufólk fram á fjórða plássið at fáa javnvág í.

Á Lista B eru listaatkkvøðurnar nóg nógvar at broyta raðfylgjuna; ikki fleiri konufólk vóru á listanum, so nakrar listaakvøður høvdu lopið av.

Á Lista C eru listaatkkvøðurnar nóg nógvar at broyta raðfylgjuna.

Á Lista D er raðfylgjan ovast á listanum "eftir bókini", men listin fekk ongan valdan. Óneyðugt var tí at býta listaatkvøður.

Á Lista E eru listaatkkvøðurnar nóg nógvar at broyta raðfylgjuna, men ásetingin í broytta § 31, stk. 2 kemur nú til sín rætt, trý mannfólk og – við býttum listaatkvøðum – eitt konufólk eru jøvn við 197 atkvøðum hvør; nú verður fyrst tikið eftir kyni, síðani eftir lutakasti.

Á Lista H eru listaatkkvøðurnar nóg nógvar at broyta raðfylgjuna.

## II. Javnstøða á valevnislista

| Galdandi ásetingar | Broyttar ásetingar |
|---|---|
| **§ 17.** Valið fer fram eftir listum, har ávísir persónar bjóða seg fram sum valevnir í einum valdømi.<br>*Stk. 2.* Ein valevnislisti má ikki hava fleiri valevni enn trý fleiri enn talið av løgtingsmonnum, tó ongantíð meiri enn tað dupulta, ið veljast skulu í valdøminum. Um henda treyt verður ikki hildin, skal listin verða lýstur ógildugur.<br>*Stk. 3.* Valevnini skulu vera so skilliga lýst við navni, starvi og bústaði, at ongin samanblanding við nakran annan valbæran persón kann standast av.<br>*Stk. 4.* Valevnislistarnir mugu vera formanninum í avvarðandi løgtingsvalnevnd í hendi í seinasta lagi kl. 18.00 3 vikur frammanundan valdegnum.<br>*Stk. 5.* Listin skal vera undirskrivaður av valevnunum og av í minsta lagi 10 og í mesta lagi 15 veljarum sum stillarum, og hjálagdur skal vera serligur listi yvir stillararnar, har teir eru skilliga lýstir við navni, starvi og bústaði. Valevnini og stillararnir kunnu eisini undirskriva á avrit av valevnislistanum. Eisini kunnu valevnini í staðin fyri við undirskrift, vátta sína uppstilling við brævi, fjarriti, telexi o.tl. Listin skal vera latin inn av einum stillara, og hesin hevur rætt til á einum avriti av valevnislistanum at fáa kvittan frá formanninum fyri, at listin er móttikin og nær.<br>*Stk. 6.* Ongin má stilla upp samstundis til val í ymsum valdømum ella sum valevni hjá meira enn einum flokki ella stilla upp uttanflokka og samstundis taka undir við einum flokki. Ger nakar ímóti hesum, verður valið, um tað fellur á hann, ógildugt.<br>*Stk. 7.* Ongin kann vera stillari fyri meira enn ein valevnislista. Hann, ið er stillari fyri fleiri listar, kann ikki roknast sum stillari hjá | **§ 17.** Valið fer fram eftir listum, har ávísir persónar bjóða seg fram sum valevnir í einum valdømi.<br>*Stk. 2.* Ein valevnislisti má ikki hava fleiri valevni enn trý fleiri enn talið av løgtingsmonnum, tó ongantíð meiri enn tað dupulta, ið veljast skulu í valdøminum. Um henda treyt verður ikki hildin, skal listin verða lýstur ógildugur.<br>***Stk. 3.* Eru á vallista valevni av øðrum kyni meira enn eitt fleiri enn av hinum, skal listin hava undantaksloyvi sambært § 8, stk. 2 í javnstøðulógini. Um henda treyt ikki verður hildin, skal listin verða lýstur ógildugur.**<br>*Stk. 4.* Valevnini skulu vera so skilliga lýst við navni, starvi og bústaði, at ongin samanblanding við nakran annan valbæran persón kann standast av.<br>*Stk. 5.* Valevnislistarnir mugu vera formanninum í avvarðandi løgtingsvalnevnd í hendi í seinasta lagi kl. 18.00 3 vikur frammanundan valdegnum.<br>*Stk. 6.* Listin skal vera undirskrivaður av valevnunum og av í minsta lagi 10 og í mesta lagi 15 veljarum sum stillarum, og hjálagdur skal vera serligur listi yvir stillararnar, har teir eru skilliga lýstir við navni, starvi og bústaði. Valevnini og stillararnir kunnu eisini undirskriva á avrit av valevnislistanum. Eisini kunnu valevnini í staðin fyri við undirskrift, vátta sína uppstilling við brævi, fjarriti, telexi o.tl. Listin skal vera latin inn av einum stillara, og hesin hevur rætt til á einum avriti av valevnislistanum at fáa kvittan frá formanninum fyri, at listin er móttikin og nær.<br>*Stk. 7.* Ongin má stilla upp samstundis til val í ymsum valdømum ella sum valevni hjá meira enn einum flokki ella stilla upp |

| | |
|---|---|
| nøkrum lista.<br>*Stk. 8.* Um valevnislisti verður lýstur ógildugur, ella um valevni verður strikað av listanum, skal henda avgerð nevndarinnar, sum er endalig, verða skrivað í valbókina, og úrskrift úr henni um hetta skjótast møguligt og í øllum førum fyri valið, verða send tí stillara, sum listan hevur latið inn.<br>*Stk. 9.* Heldur nevndin, at ein rættstundis innlatin valevnislisti er so ófullfíggjaður, at neyðugt er at gera hann ógildugan, skal nevndin beinanvegin boða viðkomandi stillara frá hesum og geva honum høvi til innan 24 tímar at bøta um brekið. | uttanflokka og samstundis taka undir við einum flokki. Ger nakar ímóti hesum, verður valið, um tað fellur á hann, ógildugt.<br>*Stk. 8.* Ongin kann vera stillari fyri meira enn ein valevnislista. Hann, ið er stillari fyri fleiri listar, kann ikki roknast sum stillari hjá nøkrum lista.<br>*Stk. 9.* Um valevnislisti verður lýstur ógildugur, ella um valevni verður strikað av listanum, skal henda avgerð nevndarinnar, sum er endalig, verða skrivað í valbókina, og úrskrift úr henni um hetta skjótast møguligt og í øllum førum fyri valið, verða send tí stillara, sum listan hevur latið inn.<br>*Stk. 10.* Heldur nevndin, at ein rættstundis innlatin valevnislisti er so ófullfíggjaður, at neyðugt er at gera hann ógildugan, skal nevndin beinanvegin boða viðkomandi stillara frá hesum og geva honum høvi til innan 24 tímar at bøta um brekið. |

Formligt uppskot:

**Uppskot**
**um broyting í løgtingslóg nr. 49 frá 20.juli 1978 um val til Føroya Løgting**

§ 1. Gjørdar verða hesar broytingar:

3. Í § 17 verður stk.3 broytt til stk. 4 osfr., og verður sett inn soljóðandi nýtt stk. 3: "*Stk. 3.* Eru á vallista valevni av øðrum kyni meira enn eitt fleiri enn av hinum, skal listin hava undantaksloyvi sambært § 8, stk. 2 í javnstøðulógini. Um henda treyt ikki verður hildin, skal listin verða lýstur ógildugur."

§ 2. Lógin kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

**Almennar viðmerkingar**

Løgtingið samtykti 20. oktober 2005, at:

"Løgtingið tekur undir við, at landsstýrismaðurin setur eina nevnd at arbeiða fyri, at kvinnur fáa ein øktan leiklut í at taka politiskar avgerðir.

Í nevndini verða: Eitt umboð fyri hvønn flokk á Løgtingi, eitt umboð fyri Føroya kommunufelag, eitt umboð fyri Kommunusamskipan Føroya, eitt umboð fyri

> Kvinnufelagasamskipan Føroya og eitt umboð fyri Javnstøðunevndina. Varalimir verða valdir fyri allar limir.”

Hetta var beinleiðis í samsvari við uppskot til samtyktar um tilráðingar frá Útnorðurráðnum í 1999, sum Løgtingið samtykti 18. november 1999.

Í viðmerkingunum til uppskotið sigur:

> “Endamálið við hesum uppskoti til samtyktar er at seta eina nevnd, sum skal skipa fyri tvørpolitiskum tiltøkum til tess at økja um talið á kvinnum á Løgtingi og í kommunustýrunum kring landið. Vónandi kann eitt úrslit av hesum arbeiði verða, at umboðanin á leið verður í samsvari við umboðanina í hinum Norðurlondunum, sum er væl hægri enn í Føroyum. Í Landstinginum eru uml. 33% konufólk, í Altinginum eru uml. 30% konufólk, og í Fólkatinginum eru uml. 39% konufólk.”

Kynbýtið á Føroya Løgtingi er út av lagi vánaligt – bert tríggjar kvinnur eru av 32 tingumboðum, svarandi til færri enn 10%. Hetta hóast kallmenn bert fingu 71,1 %, kvinnur 16,1 %, og 12,8 % ikki atkvøddu fyri nøkrum kyni, uttan heldur fyri listanum.

Samsvarandi viðmerkingini um, at “úrslit av hesum arbeiði skal verða, at umboðanin á leið verður í samsvari við umboðanina í hinum Norðurlondunum,” hevur hetta uppskotið til endmáls at tryggja javna uppstilling eftir kyni, soleiðis at umboðanin á Føroya Løgtingi, bæði fasta umboðanin og umboðanin ígjøgnum varaumboð, verður javnari eftir kyni.

Uppskotið ber í sær, at valevnislistar koma undir somu reglu sum almennar nevndir, nevniliga, at nærum eins nógv valevni skulu vera av hvørjum kyni. Frávik frá hesum kunnu fyrst og fremst koma fyri, tá ólíkatal av valevnum er uppstillað, og so tá talan er um flokkar ella fylkingar, ið ikki hava limir av øðrum kyninum, ella har ongin persónur av øðrum kyninum býður seg fram.

### Serligar viðmerkingar

*Nýtt § 17, stk. 3*

Ásetingin ger, at mannagongdin í javnstøðulógini § 8 skal brúkast til valevnislistar. Flokkur ella fylking, ið stilla upp, mugu tryggja sær nærum javna umboðan av báðum kynum, men kunnu tó fáa undantaksloyvi, um so er, at viðkomandi felagsskapur hevur gjørt nøktandi og viðkomandi roynd at fáa kynsjavnauppstilling í lag. Størri frávikið er frá sama tali (burtursæð frá ólíkatali) av hvørjum kyni, verri verður at fáa undantaksloyvi.

Hjá størru flokkunum og hjá smærri flokkum í sterku valdømum teirra kemur helst ikki uppá tal at geva frávik uttan í heilt serligum førum at loyva fráviki uppá eitt valevni (afturat ólíkatali).

# Fylgiskjal 3

Fíggjarnevnd løgtingsins
Føroya løgting
Tinghúsvegur
100 Tórshavn

Fíggjarmálaráðið
Traðagøta 39
160 Argir

Vinnumálaráðið
Tinganes
100 Tórshavn

Tórshavn, 29. august 2007

**Evni: Játtan til javnstøðunevndina**

Javnstøðunevndin samtykti á fundi 22. august at heita á politisku myndugleikarnar at tryggja játtanina til javnstøðuarbeiðið í 2008.

Í verandi fíggjarári er samlaða játtanin til javnstøðu kr. 291.000 til javnstøðunevndina og kr. 325.000 til Nevndina fyri øktum kvinnuleikluti í politikki (Demokratia).

Javnstøðunevndin heitti á politisku myndugleikarnar um at játta hesa samlaðu upphæddina við kostnaðarhækkingum umleið kr. 650.000 til javnstøðuarbeiðið næsta fíggjarár.

Javnstøðunevndin hevur lógarbundnar uppgávur sambært lóg um javnstøðu. Nevndin skal millum annað viðgera mál um mismun á arbeiðsmarknaðinum, mál um samanseting av almennum nevndum og vera ráðgevandi í javnstøðumálum. Harumframt kemur, at nevndin, tá ið arbeiðssetningurin hjá Demokratia gongur út, má fylgja tí arbeiðinum upp.

Javnstøðunevndin hevur seinasta árið lagt stóran dent á arbeiðsmarknaðarrelgurnar í lógini. Nevndin viðger í løtuni fleiri mál um mismun og ætlar í samstarvi við hini norðurlondini og partarnar á arbeiðsmarknaðinum at fara undir royndir við lønarkortlegging til tess at fáa mismunin í løn vegna kyn burtur sum frá líður.

Verandi játtan hjá javnstøðunevdini er ónøktandi. Nevndin hevur bert hálvan fakligan skrivara og onki skrivstufólk og vánalig ráð at gera skrivstovuavtalur. Nevndin hevur ongan løgfrøðing, og má formaðurin tí taka sær av tí løgfrøðiliga. Fasta formanssamsýningin er

nógv ov lág í mun til arbeiðsorkuna. Antin má nevndin fáa parttíðar løgfrøðing, ella má samsýningin hækka. Á sama hátt er neyðugt at fáa í lag, at nevndin fær førleika ella tænastu innan hagfrøði, teldufrøði og annan fakligan kunnleika antin við starvsfólki ella samstarvsavtalum. Harumframt kemur, at nevndin eftir lógini hevur skyldu at føra rættarmál, um avgerðir hennara ikki vera fylgdar, og til hesi mál má nevndin hava nøktandi játtan.

Serliga kann nevnast, at nevndarskrivarin seinasta árið eisini hevur virkað sum skrivari hjá Demokratia, og tí er upplagt at javnstøðunevndin fær til uppgávur at fylgja tí arbeiðnum upp.

Vinarliga

Kári á Rógvi, formaður

# Fylgiskjal 4

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
100 Tórshavn

Tórshavn, 27. mars 2007

**Evni: Umsókn um undantaksloyvi at seta útbúgvingarráð (manning á skipum o.ø.)**

Mentamálaráðið hevur í skrivi dagfest 22. januar 2007 søkt Javnstøðunevndina um undantaksloyvi sambært javnstøðulógini, § 8, stk. 2, í sambandi við setan av útbúgvingarráði um útbúgving av manning á skipum o.ø.

Ætlanin er at manna útbúgvingarráðið við seks umboðum frá Maskinmeistarafelagnum, SEV, Føroya Reiðarafelag, Skipaeftirlitinum, og Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag og Reiðarafelagnum fyri Farmaskip. Teir fimm fyrru eru mannfólk, umboðið fyri seinast nevndu er konufólk.

Í umsóknini verður sagt, at økið altíð hevur verið myndað av monnum, og at hetta sæst aftur, bæði á limalistunum í vinnufeløgunum á sjónum, og á næmingunum í ymsu útbúgvingunum. Tó er eydnast at fáa eina kvinnu við í útbúgvingarráðið; bæði kynini eru sostatt umboðað.

Mentamálaráðið vísti ikki á nakrar nærri kanningar av hesum kynsójavna, ella hvørt nevndu stovnar og feløg bert hava mannfólk í starvi.

Javnstøðunevndin bað í svarskrivi dagfest 7. mars um innlit í mannagongdina í sambandi við setanina av útbúgvingarráðnum, við serligum atliti til áherðsluna á kynsbýtið. Haraftrat vildi nevndin vita, hví t.d. SEV skal umboðast í ráðnum, meðan Mentamálaráðið ella annar óheftur stovnur/felag einki umboð hevur.

Í svarskrivi frá 20. mars hevur Mentamálaráðið greitt frá mannagongdini. Mentamálaráðið sigur m.a., at tað er landsstýrismaðurin, sum avger samansetingina og limatalið í útbúgvingarráðnum, og at Mentamálaráðið sjálvt skal vera óheft av útbúgvingarráðnum sbrt. § 5, stk. 2, í Ll. Nr. 55 frá 24. apríl 2001 um útbúgving av manning á skipum o.ø. Men eingin frágreiðing er um, hví eingi óheft umboð frá øðrum feløgum/stovnum eru tilnevnd, ið kundu fingið kynsbýtið javnari.

Javnstøðunevndin hevur kortini viðgjørt umsóknina og samtykt at ganga henni á møti vísandi til, at helst er talan um ójavnt kynsbýti á viðkomandi vinnuøki og at bæði kynini hóast alt eru umboðaði.

Javnstøðunevndin fer tó við hesum tó at minna Mentamálaráðið á at taka atlit til javnstøðu í framtíðini, tá ið nevndir, ráð og líknandi skulu setast. Góður siður er at geva stovnum, feløgum o.t. høvi at lata inn fleiri uppskot, so til ber hjá viðkomandi at vísa á fólk av báðum kynum. Eisini ber til at víðka limatalið, soleiðis at lættari er at fáa eitt javnari kynsbýti.

Vinarliga

Bjørg Jacobsen, nevndarskrivari

# Fylgiskjal 5

## Norðurlendskur javnstøðuumboðsfundur á Hotel Føroyum 10. mai 2007

**Ísland**
Íslendska javnstøðunevndin arbeiðir við at leingja barsilsfarlovið úr 9 upp í 12 mánaðir – 4 til hvørt av foreldrunum og 4 at býta ímillum sín. Óvist er tó, um hetta fer at eydnast enn. Íslendska barsilsfarloyvisskipanin frá 1997 er kanska heimsins mest framkomna sæð við javnstøðubrillum. Hon gevur íalt 9 mánaða farloyvi. 3 mánaðir eru oyramarkaðir til mammuna, 3 til pápan, og hinar 3 kunnu foreldrini býta ímillum sín eftir egnum ynski. Í praksis er tað oftast mamman, ið tekur hesar 3 mánaðirnar, tvs. at mamman heldur 6 og pápin 3 mánaðir barsil. Hinvegin tryggjar skipanin, at páparnir í minsta lagi taka sínar 3 mánaðir; teir kunnu nevniliga ikki yvirførast til mammuna. Næstan allir íslendskir pápar brúka sín farloyvisrætt.

Javnstøðunevndin arbeiðir eisini við at fáa sett eina kampagnu í verk um hvør fyritøka, kommuna, stovnur o.t. er best í javnstøðu. Ætlanin er at býta smileys út til teirra, sum liva upp til javnstøðulógina. Í 2006 bleiv ein virkisætlan um harðskap móti kvinnum og børnum sett í verk fyri fyrstu ferð í Íslandi. Sosialmálaráðið skipar fyri og fíggjar ætlanina.
www.jafnretti.is

**Grønland**
Nýggj javnstøðunevnd er sett í Grønlandi í ár. Vegna høgu ferðaútreiðslurnar heldur nevndin bara 3 fundir um árið.
Javnstøða í familjuni er frammarliga í javnstøðunevndararbeiðinum, herundir serliga alkoholtrupulleikar og harav fylgjandi harðskapur. Nevndin hevur staðið fyri tv-spots um harðskap í familjuni, sum vísa ymiskar situatiónir, sum ofta elva til harðskap. Endamálið er at fáa fólk at kenna seg aftur og ásanna, at tey hava hjálp fyri neyðini.

Kreppumiðstøðir fyri kvinnur hava verið til síðan í 1980unum, men mannfólk í kreppu hava ongastaðni at fara. Myndugleikarnir umhugsa eina kreppumiðstøð fyri menn. Í roynd at bøta um viðurskiftini hevur Javnstøðunevndin arbeitt við at seta mannfólkabólkar á stovn, har menn, sum hava trupulleikar við alkoholi, at samskifta og/ella harðskapi, kunnu fáa hjálp at samskifta og rágeving annars frá psykologum og øðrum. Royndirnar higartil hava verið góðar, og stórur áhugi er fyri at sleppa á skeið. Ynskiligt er at fáa slíkt virksemi í øllum 18 kommununum.

Í 2004 skipaði Javnstøðunevndin fyri skeiðvirksemi fyri kvinnur, sum høvdu ella ætlaðu at stilla upp í politikki. Áhugin var stórur, og árið eftir hækkaði talið av kvinnuligum landstinglimum úr 20 upp í 40%.

Almennar nevndir, ráð o.t.
Sjálvt um fleiri kvinnur eru settar í almennar nevndarsessir o.t. seinastu árini, eru menninir enn í stórum meiriluta.
www.nali.gl

**Noreg**
Noreg hevur onga javnstøðunevnd longur, men í staðin ein stovn við heitinum Likestillings- og diskrimineringsombudet. Stovnurin arbeiðir ímóti diskriminatión og roynir at fremja javnstøðu uttan mun til kyn, etnisitet, brek, tungumál, religión, seksuella orientering, aldur osfr. Stovnurin er fakliga óbundin, men virkar umsitingarliga undir Barna- og Javnstøðumálaráðnum.

Sostatt eru øll mál um diskriminatión nú savnað saman í einum og sama stað. Hetta merkir betri verju fyri t.d. borgarar við breki ella aðrari seksuellari orientering, sum áður einki serstakt organ høvdu at kæra til, meðan borgarar við øðrum húðarliti ella etnisiteti høvdu sín egna kærustovn.

Hinvegin er ikki altíð so einfalt at definera, hvat slag av diskriminatión talan er um. Um t.d. ein immigrantkvinna sigur seg vera diskrimineraða, tí hon gongur við turriklæði ella burka, er tað so religiøs, kynslig ella etnisk diskriminatión? Umskering av gentubørnum og ódemokratiskar útsagnir eru heldur ikki einføld mál at viðgera. Hinvegin var tað uppaftur verri fyrr, tá málini vóru sundurbýtt millum fleiri organ. Likestillings- og diskrimineringsombudet er í ferð við at byggja upp eina praksis, sum vónandi fer at gagna javnstøðuni og stríðnum móti diskriminatión.
www.ldo.no

**Svøríki**
Kvinder som under graviditet har fået nedsat arbejdsevne pgra graviditeten
Relativt få anmelelser fra etniske kvinder
Præst så homofile som en svulst som skulle bort
Forklara lønarskilnaderna

Sambært World Economic Forum 2006, sum hevur mátað fíggjarliga luttøkuna, fíggjarligu møguleikarnar, politisku ávirkanina, útbúgvingarstøðið og heilsustøðuna hjá kvinnum, er Svøríki heimsmeistari í javnstøðu. Tey fimm fremstu londini eru:

1. Svøríki
2. Noreg
3. Ísland
4. Danmark
5. Finland

Hóast nr. 1 halda svenskarar seg verri enn so vera komnar á mál, og nógvar virkisætlanir eru og verða settar í verk. Ein teirra er lønarkortleggingin. Javnstøðulógin fyriskrivar, at menn og kvinnur skulu hava somu løn fyri sama arbeiði ella arbeiði av sama virði. Men ikki er greitt, hvussu virði av einum arbeiði skal definerast. Hetta hevur svenska javnstøðunevndin roynt at gera nakað við í stóra lønarkortleggingarprojektinum. Her verða ymiskar útbúgvingar, arbeiðsfunktiónir, mannagongdir o.a. kortlagdar og analyseraðar til tess at kunna definera virðini – altso lønina – á ymisku størvunum. Sí annars www.jamombud.se

Svenskir menn tjena í lívi sínum í miðal ¼ millión fleiri svenskar kr. enn kvinnur. Orsøkin er, at kvinnur arbeiða í miðal minni enn menn, men eisini, at tær í miðal fáa lægri løn. Lønarmunirnir vísa seg serliga seinast í tjúguárunum, tá tey flestu stovna familju og heim. Kvinnur kombinera tá í størri mun lønararbeiði við heim og børn, meðan menn í størri mun kombinera tað við politiskt vald ella aðra ávirkan.

Fleiri mátar eru at máta javnstøðu, og tøl eru ikki nóg mikið:

Kvantitativ javnstøða – javnt býti millum menn og kvinnur á øllum samfelagsøkjum.
Kvalitativ javnstøða – at kunnleikar, royndir og áskoðanir hjá monnum og kvinnum hava somu vekt. Dømi: 45% av limunum í Ríkisdegnum eru kvinnur. Kvalitativ ójavnstøða er, at kvinnurnar í Ríkisdegnum Kvantitativ javnstøða

Ex: Kvantitativt jämställt: 45 procent kvinnliga ledamöter i riksdagen. Kvalitativt ojämställt: Kvinnorna i riksdagen blir förlöjligade, osynliggjorda och kränkta (SvD, 8.3.2004).

**Danmark**
Danmark er í ferð við at umskipa og víðka javnstøðuøkið. Ætlanin er at seta ein nýggjan stovn, Klagenævnet for Ligebehandling. Allar kærur um diskriminatión verða savnaðar á hesum stovni. Tað merkir, at borgararnir í framtíðini kunnu kæra til ein og sama stovn, um teir halda seg hava verið fyri mismuni vegna kyn, rasu, húðarlit, trúgv, aldur, brek, nationalan, sosialan ella etniskan uppruna, politiska áskoðan ella seksuella orientering. Sum er, kunnu bara tey kæra, sum meta seg vera diskriminerað vegna kyn, rasu ella etniskan uppruna. Nýggi stovnurin avloysir verandi stovnarnar Ligestillingsnævnet og Klagekommitéen for Etnisk Ligebehandling, sum verða niðurlagdir. Arbeiðið við at umskipa økið er tó ikki gingið heilt eftir ætlan, og óvist er, nær og hvussu stovnurin fer at virka.

EU hevur kosið árið 2007 sum europeiskt ár fyri líka møguleikar fyri øll. Endamálið er at økja um kunnleikan til lóggávu, politikk og vitan um líka møguleikar fyri øll, uttan mun til aldur, brek, kyn, etnisitet, trúgv, religión ella seksuella orientering. Projektið snýr seg ikki um, at øll skulu vera eins, men nettupp at fjølbroytnið skal varðveitast, men at øll samstundis skulu hava somu møguleikar.

Danmark hevur sett sær fyri at royna at røkka ein breiðan málbólk – tvs. privata og almenna arbeiðsmarknaðin, fakfeløg, feløg og einstaklingar. T.d. er nógv upplýsingartilfar

framleitt, sum er ætlað at fáa fólk at hugsa og kjakast um fjølbroytni, og hvussu Danmark kann gerast dugnaligari at geva øllum sínum borgarum líka møguleikar. Tað snýr seg ikki minst um at fáa ein minni kynsuppbýttan og harvið liðiligari arbeiðsmarknað, sum kann tryggja framtíðarinnar framburð og vælferð. Sum er, er danski arbeiðsmarknaðurin ein tann mest kynsuppbýtti í heiminum.

Dentur verður lagdur á konkret tiltøk. Pedagogar og lærarar skulu skúlast í at menna børnini út frá evnum og áhugamálum, og ikki út frá traditionellum mynstrum. Tá dreingirnir t.d. velja at fara í starvsvenjing sum fløskudreingir og genturnar sum pedagoghjálparfólk, kunnu lærararnir seta inn og fáa tey at hugsa øðrvísi.

Top Leder Camp í juni 2006 var eitt felags tiltak hjá danska javnstøðumálaráðharranum og Dansk Industri. Endam álið var at fremja fjølbroytni og fáa fleiri kvinnur í leiðslur. Nógv ymisk fólk sótu saman á Top Leder Camp í tveir dagar, eisini fólk, sum vanliga ikki arbeiða við javnstøðu. Nógv áhugaverd hugskot komu burturúr, sí www.topledercamp.dk.

Tað almenna hevur skyldu at ganga fremst, og øll ministeriir, kommunur, amt og almennar fyritøkur og stovnar við meira enn 50 starvsfólkum hava sent eina javnstøðufrágreiðing inn til javnstøðumálaráðið. Frágreiðingarnar geva innlit í, hvussu stendur til við javnstøðuni í almenna sektorinum. Teir ymisku instansirnir fáa stigatal fyri javnstøðuarbeiði sítt, og á einum landkorti ber til at síggja, hvussu raskir ymisku landspartanir eru, sí www.ligestillingidanmark.dk.

Sí eisini:
www.hvorfor-ikke.dk
www.lige07.dk
www.ligenaevn.dk
www.lige.dk